RÚSDREKKASØLA LANDSINS

# Ársfrágreiðing 2014

# Innihaldsyvirlit

1. Inngangur ..... 3

2. Árið ..... 4

3. Búskapur ..... 5

3.1 Umsetningur ..... 5

3.2 Sølugongdin gjøgnum árið ..... 5

3.3 Rakstraravlopskravið ..... 5

4. Rúsdrekkasølan, nýtsla og hagtøl ..... 6

4.1 Umsetningurin, býttur út á deildir ..... 6

4.2 Sølugongd í litrum býtt í vørubólkar ..... 7

4.3 Sølugongd í alkohol litrum býtt í vørubólkar ..... 7

4.4 Fólkatal og gongdin í nýtslu pr. íbúgva ..... 8

5. Ársroknskapur fyri 2014 ..... 9

Rakstrarroknskapur ..... 9

Fíggjarstøða ..... 10

# 1. Inngangur

Rúsdrekkasøla Landsins er stovnur undir Føroya landsstýri. Rúsdrekkasølan virkar sambært løgtingslóg nr. 20 frá 10. mars 1992 við seinni broytingum og ásetingum í kunngerð nr. 144 frá 20. oktober 1992 við seinni broytingum.

Rúsdrekkasølan hevur til endamáls at innflyta og selja rúsdrekka. Rúsdrekkasølan hevur einkarætt til innflutning av rúsdrekka og við ávísum avmarkingum og undantøkum eisini einkarætt til sølu av rúsdrekka. Stovnurin skal í so stóran mun sum gjørligt, rekast út frá handilsligum sjónarmiðum, tó við neyðugum atliti til heilsulig sjónarmið.

Rúsdrekkasølan hevur seks handlar kring landið. Teir liggja í: Tórshavn, Klaksvík, Saltangará, Miðvági, Sandi og Drelnesi. Handlarnir virka eisini sum fløskumóttøkur. Harumframt er goymsla á Hjalla og fyrisitingin húsast í Tórshavn. Øll hølini eru leigumál.

Rúsdrekkasøla Landsins hevur umleið 30 fólk í føstum starvi. Harafturat eru upp til umleið 30 fólk í tímaløntum starvi.

Í hesi ársfrágreiðing verður tikið samanum árið 2014. Komið verður inn á gongdina í søluni, fíggjarlig viðurskifti og annað, sum hevur merkt árið og raksturin í 2014.

Tórshavn, tann 10. april 2015

Rógvi Andrias Fossádal
stjóri

## 2. Árið

Síðan einkarsølan Rúsdrekkasøla Landsins (RSL) varð sett á stovn, er ein miðvís broyting í drekkimynstrinum í Føroyum farin fram. Frá í mestan mun at drekka spirtus er drekkimynstrið støðugt broytt til, at tað fyri tað fyrsta verður drukkið minni. Ístaðin verður keypt minni av spiritusi og meira vín og øl, sum hevur eitt lægri alkohol styrki. Hetta kunnu vit bert fegnast um, tí tað var júst hetta, sum upprunaliga var málsetningurin við rúsdrekkalógini og einkarsøluni. Staðfestast kann, at einkarsølan virkar væl sum alkohol politiskt stýringsamboð.

Broytingin í drekkimynstrinum hevur eisini stóra ávirkan á inntjeningina hjá RSL og skyldast hetta avgjalds og príspolitikkin. RSL hevur undanfarnu árini arbeitt miðvíst við at tillaga raksturin til broytingarnar í alkohol nýtsluni. Samstundis er rakstrarkostnaðurin hjá RSL, ikki øktur hóast lønarhækkingar og aðrar príshækkingar.

Arbeitt hevur verið støðugt við at menna landsfyritøkuna so at hon verður á jøvnum føti við fremstu rúsdrekkasølur í norðurlondum. Tað er avgerandi, at RSL áhaldandi lagar seg til tann eftirspurning, sum viðskiftafólk okkara eftirspyrja og ynskja.

RSL seldi í 2014 fyri 119 mió. ella 0,41% meir enn í 2013, tá sølan var 118 mió.

Avlopskravið á fíggjarlógini var óbroytt á 16,848 mió., og bleiv næstan rokkið. Tað bleiv selt nakað meira av spiritusi, víni og øli, meðan tað bleiv selt áleið tað sama av heitvíni og alkoholfríum vørum. Søluvøksturin í litrum stavar í stóran mun frá øktari tollfríari sølu.

Nýtslan í ár liggur enn á lægsta støði síðan RSL varð stovnað í 1992. Og er tað í trá við endamálið hjá RSL, ið m.a. sigur, at "Stovnurin skal, í so stóran mun, sum gjørligt, rekast út frá handilsligum sjónarmiðum, tó við neyðugum atliti til heilsulig sjónarmið."

Leiðslan í RSL hevur í tíðarskeiðnum millum 2010 og 2014 gjørt stórar tillagingar fyri at røkka økta avlopskravinum, sum í 2009 fór úr 11,848 mió. til 16,848 mió. í 2010 og frameftir.

Arbeitt hevur áhaldandi verið í móti einum skynsamari rakstri og bygnaði fyri at minka um útreiðslurnar uttan at niðurlaga tænastustøði.

Starvsfólkakostnaðurin fall í tíðarskeiðnum 2008-2013 til index 97, meðan hann í tíðarskeiðnum 2008-2014 vaks til index 105. Starvsfólkakostnaðurin svaraði í 2014 til 11% av søluni eftir at hava verið 10% av søluni í 2013. Í 2014 gjørdi Gerðarrætturin úrskurð í einum trætumálið millum Lønardeildina hjá Fíggjarmálaráðnum og Starvsmannafelagið. Hesin úrskurður viðførdi, at 10 leiðarar hjá RSL blivu umflokkaðir í ein hægri lønarflokk. Fíggjarliga avleiðingin gjørdist ein økt lønarútreiðsla á 450 tkr. í 2014 og uml. 400 tkr. í 2015 og frameftir. Ein avleiðing av hesum er, at starvsfólkatalið er skert við tveimum starvsfólkum. Henda tillaging fær tó ikki fíggjarligan virknað fyrr enn í mai 2015.

Í fleiri ár hevur leiðslan eftir fíggjarligum førimuni havt fokus á at dagføra og uppstiga handlarnar kring landið. Í mai 2014 bleiv deildin í Sandoy flutt úr Skálavík til Sands tá mett varð, at RSL kundi veita eina betur tænastu fyri alla oynna av Sandi.

Samanumtikið metir leiðslan, at árið eftir umstøðunum hevur eydnast væl.

# 3. Búskapur

## 3.1 Umsetningur

Seinastu sjey árini hevur umsetningurin hjá Rúsdrekkasøluni ligið millum uml. 117 og 121 mió. kr.

Í 2014 øktist sølan við 0,49 mió, í mun til 2013, men umsetningurin var tó minni enn í 2010 og 2012, og størri enn 2008, 2009, 2011 og 2013.

Umsetningurin fyri seinastu árini sær soleiðis út:

| (1.000 kr.) | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Umsetningur | 119.286 | 118.800 | 120.140 | 117.659 | 120.743 | 117.799 | 116.844 |

*Talva 3.1: Árligi umsetningurin, 2008-2014*

## 3.2 Sølugongdin gjøgnum árið

Mánaðarliga sølan er rættiliga skiftandi gjøgnum árið. Januar og februar eru vanliga mánaðir við minst sølu, meðan sølan um summarið og fram ímóti ársskiftinum vanliga er størri.

Gongdin í søluni í 2014 var nakað øðrvísi enn árið fyri. Jan, feb, juli, okt, og des vóru betri enn væntað, meðan sølan í mars, mai og juni var lægri. Hinir mánaðirnir vóru áleið, sum væntað.

| (1.000 kr.) | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Januar** | 6.903 | 6.719 | 6.576 | 6.086 | 6.290 | 6.577 | 6.951 |
| **Februar** | 7.527 | 7.473 | 7.822 | 7.405 | 7.777 | 8.181 | 8.306 |
| **Mars** | 8.016 | 10.235 | 9.068 | 8.954 | 10.435 | 8.061 | 8.667 |
| **Apríl** | 8.883 | 7.859 | 9.301 | 9.436 | 7.560 | 9.397 | 8.484 |
| **Mai** | 10.295 | 10.887 | 10.814 | 9.823 | 9.958 | 10.054 | 10.131 |
| **Juni** | 10.477 | 11.210 | 10.949 | 10.400 | 10.536 | 9.942 | 9.599 |
| **Juli** | 14.332 | 13.054 | 13.844 | 14.402 | 15.957 | 15.243 | 13.360 |
| **August** | 9.406 | 9.499 | 9.025 | 8.543 | 8.541 | 8.173 | 8.485 |
| **September** | 8.298 | 8.006 | 7.955 | 9.010 | 8.480 | 7.625 | 8.065 |
| **Oktober** | 9.667 | 8.445 | 8.811 | 8.842 | 9.460 | 8.995 | 9.510 |
| **November** | 9.362 | 9.926 | 10.490 | 8.623 | 10.681 | 8.713 | 8.766 |
| **Desember** | 16.120 | 15.487 | 15.483 | 16.134 | 15.068 | 16.839 | 16.522 |
| **Íalt** | **119.286** | **118.800** | **120.140** | **117.659** | **120.743** | **117.799** | **116.844** |

*Talva 3.2: Umsetningurin fyri hvønn mánað, 2008-2014*

## 3.3 Rakstraravlopskravið

Í 2010 var kravið til avlop av rakstrinum hækkað við útvið 50%, frá at vera góðar 11,8 mió. kr. til at vera góðar 16,8 mió. kr. Hetta hevur havt við sær príshækkingar á vørunum og rationaliseringar, til tess at minka um útreiðslurnar. Hetta hevur borið til við m.a. at steðga viðlíkahald og útskifting av útbúnaði, umframt at hava neyvt eftirlit er við øllum útreiðslupostum.

Ein framgongd í umsetninginum frá 2013 til 2014, kann vera ábending um, at rúsdrekkanýtslan í Føroyum er voksin. Tó stavar hesin vøkstur nærum einans frá framgongd í tollfríari sølu. Vinningurin á tollfríari vøru er sera lítil í mun til vinningin av vøru seld í egnum sølubúðum.

Í 2014 vaks umsetningurin við góðum 0,49 mió. í mun til undanfarna árið. Tað eydnaðist tó ikki at røkka avlopskravinum, sum varð ásett í løgtingsins fíggjarlóg fyri 2014.

Kravið var kr. 16.848.000 aftaná rakstrarútreiðslur og útreiðslur til høli, starvsfólk og umsiting. Tá árið varð gjørt upp, gjørdist avlopið bert kr. 16.649.895, tvs. ein munur uppá 198.105 kr.

Orsøkin til at avlopskravið ikki bleiv rokkið var øktar starvsfólkaútreiðslur og broytt sølumix - Selt varð meira veikt og meira tollfrítt við minni vinningi.

Talvan 3.3 niðanfyri vísir gongdina í játtan og avlopi hjá RSL í tíðarskeiðnum 2008-2014.

| (1.000 kr.) | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Avlopskrav** | 16.848 | 16.848 | 16.848 | 16.848 | 16.848 | 11.848 | 11.848 |
| **Avlop** | 16.650 | 16.856 | 16.849 | 16.308 | 16.505 | 11.731 | 11.733 |
| **Munir** | -198 | 8 | 1 | -540 | -343 | -117 | -115 |

*Talva 3.3: Avlop frá rakstrinum, 2008-2014*

At avlopskravið hækkaði so nógv í 2010, hevði  við sær, at fleiri umskipanir vórðu gjørdar, bæði viðvíkjandi prísásetingini og í raðfestingunum innanhýsis. Førleikamenningin varð avmarkað, og væl minni varð brúkt til íløgur og viðlíkahald, enn í tíðini undan hækkaða avlopskravinum.

Við óbroyttum inntøkum er vandi fyri, at hækkaða avlopskravið fær óhepna ávirkan á tænastustøðið, menning og trivnaðin. Neyðugar íløgur í fløskumóttøkur, handlar, tólbúnað, førleikamenning o.l., ið skulu gerast, viðvirka til, at tað frameftir gerst alt truplari at liva upp til ásetta avlopskravið.

# 4. Rúsdrekkasølan, nýtsla og hagtøl

Í hesum parti eru hagtøl og vísutøl sett upp fyri søluna í 2014, og samanborðin við undanfarin ár. Viðmerkingar verða eisini gjørdar til einstøku talvurnar.

## 4.1 Umsetningurin, býttur út á deildir

| (1.000 kr.) | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Tórshavn** | 54.200 | 53.925 | 54.841 | 55.117 | 56.276 | 53.814 | 53.881 |
| **Klaksvík** | 11.745 | 11.668 | 11.743 | 10.969 | 10.918 | 9.753 | 9.827 |
| **Drelnes** | 9.205 | 9.481 | 9.124 | 9.091 | 9.474 | 9.298 | 9.748 |
| **Miðvágur** | 6.960 | 6.874 | 6.961 | 6.693 | 6.867 | 6.069 | 6.145 |
| **Skálavík/Sand** | 2.449 | 2.149 | 2.367 | 2.292 | 2.333 | 2.298 | 2.206 |
| **Saltangará** | 14.400 | 14.284 | 14.570 | 14.390 | 14.595 | 14.449 | 14.288 |
| **Ordrar o.a.** | 20.327 | 20.419 | 20.534 | 19.106 | 20.282 | 22.117 | 20.748 |
| **Íalt** | **119.286** | **118.800** | **120.140** | **117.659** | **120.743** | **117.799** | **116.844** |

*Talva 4.1: Umsetningur, 2008-2014*

Talvu 4.1 omanfyri vísir, at umsetningurin hevur verið relativt stabilur árini 2008-2014. Umleið helvtin av umsetninginum stavar frá deildini í Tórshavn.

| (Vísutal) | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Tórshavn** | 101 | 100 | 102 | 102 | 104 | 100 | 100 |
| **Klaksvík** | 120 | 119 | 119 | 112 | 111 | 99 | 100 |
| **Drelnes** | 94 | 97 | 94 | 93 | 97 | 95 | 100 |
| **Miðvágur** | 113 | 112 | 113 | 109 | 112 | 99 | 100 |
| **Skálavík/Sand** | 111 | 97 | 107 | 104 | 106 | 104 | 100 |
| **Saltangará** | 101 | 100 | 102 | 101 | 102 | 101 | 100 |
| **Ordrar o.a.** | 98 | 98 | 99 | 92 | 98 | 107 | 100 |
| **Íalt** | **102** | **102** | **103** | **101** | **103** | **101** | **100** |

*Talva 4.2: Umsetningur, vísutøl 2008-2014*

Í talvu 4.2 eru vísutølini sett til 100 í 2008.  Í 2014 eru samlaðu tølini 102. Tað er stórur vøkstur á deildunum í Klaksvík, Sandi og Miðvági í tíðarskeiðnum 2008-2014. Umsetningurin á hinum deildunum stendur antin í stað ella er fallin hesi seinastu árini. Afturgongd er í umsetninginum í Suðuroy og í bíleggingum/ordrum o.l., meðan Saltangará og Tórshavn so at siga standa í stað.

Bíleggingar/Ordrar verða vanliga avgreiddar gjøgnum høvuðsgoymsluna á Hjalla. Samanumtikið er sølan í kr. relativt stabil kring landið.

## 4.2 Sølugongd í litrum býtt í vørubólkar

Í talvu 4.3 er sølan gjørd upp í litrum og býtt í vørubólkar. Nógv størsti parturin av søluni í litrum er øl. Síðani kemur vørubólkurin vín/cider og spiritus. Minstu bólkarnir eru heitvín og alkoholfríar vørur.

| (Litrar) | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Spiritus | 246.863 | 242.219 | 246.833 | 253.595 | 267.187 | 283.983 | 293.283 |
| Vín og cider | 508.121 | 490.093 | 476.567 | 463.205 | 471.745 | 459.605 | 385.350 |
| Heitvín | 9.741 | 9.741 | 9.236 | 10.067 | 10.688 | 11.129 | 11.424 |
| Øl | 1.025.672 | 980.493 | 1.036.304 | 1.032.874 | 1.100.784 | 1.102.801 | 1.155.632 |
| Alkoholfrítt | 776 | 928 | 1.401 | 935 | 831 | 579 | 670 |
| **Í alt** | **1.791.173** | **1.723.474** | **1.770.341** | **1.760.676** | **1.851.235** | **1.858.097** | **1.846.359** |

*Talva 4.3: Sølan í litrum í ymiskum bólkum, 2008-2014*

| (Vísutal, litrar) | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Spiritus | 84 | 83 | 84 | 86 | 91 | 97 | 100 |
| Vín og cider | 132 | 127 | 124 | 120 | 122 | 119 | 100 |
| Heitvín | 85 | 85 | 81 | 88 | 94 | 97 | 100 |
| Øl | 89 | 85 | 90 | 89 | 95 | 95 | 100 |
| Alkoholfrítt | 116 | 139 | 209 | 140 | 124 | 86 | 100 |
| **Í alt** | **97** | **93** | **96** | **95** | **100** | **101** | **100** |

*Talva 4.4: Sølan í litrum í ymiskum bólkum, vísutøl 2008-2014*

Talva 4.4 vísur gongdina í litrum/vørubólkum, sum indekseraði tøl. Største afturgongdin sæst í tíðarskeiðnum 2008-2014 í vørubólkunum Spiritus og Øl, meðan største framgongdin í sama tíðarskeiði sæst í vørubólkinum Vín og cider. Hetta vísir, at drekkimynstrið broytist soleiðis, at føroyingar keypa veikari sløg av rúsdrekka nú enn fyrr.

## 4.3 Sølugongd í alkohol litrum býtt í vørubólkar

| (Alk. litrar) | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Spiritus | 88.079 | 88.849 | 91.331 | 94.179 | 97.982 | 104.065 | 106.600 |
| Vín og cider | 60.057 | 58.138 | 56.219 | 54.718 | 55.038 | 54.016 | 48.334 |
| Heitvín | 1.679 | 1.682 | 1.588 | 1.713 | 1.817 | 1.889 | 1.955 |
| Øl | 55.142 | 52.435 | 54.923 | 52.774 | 56.056 | 55.918 | 58.554 |
| **Íalt** | **204.957** | **201.104** | **204.061** | **203.384** | **210.893** | **215.888** | **215.443** |

*Talva 4.5: Sølan, gjørd upp í alkohol litrum, 2008-2014*

Í talvu 4.5 er sølan av rúsdrekkanøgdini umroknað til litrar av reinum alkoholi (alkohol litrar). Talvan vísur, at samlaðu alkohol litrarnir minka javnt. Hetta er í tráð við tálmandi politikkin, sum RSL arbeiðir eftir. Útvið helmingurin tvs. uml. 44% av alkohol litrunum stava frá sølu av spiritusi, meðan uml. 29% stava frá vín og cider. Øl er 27% av samlaðu nøgdini av seldum alkohol litrum. Samlað sæst, at sølan í alkohol litrum í tíðarskeiðnum 2008-2014 er óbroytt. Ein afturgongd hevur tó verið í alkohol litrum seldir í sølubúðunum hjá RSL, meðan ein framgongd hevur verið í tollfríari sølu.

| (Vísutal, alk.l.) | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Spiritus | 83 | 83 | 86 | 88 | 92 | 98 | 100 |
| Vín og cider | 124 | 120 | 116 | 113 | 114 | 112 | 100 |
| Heitvín | 86 | 86 | 81 | 88 | 93 | 97 | 100 |
| Øl | 94 | 90 | 94 | 90 | 96 | 95 | 100 |
| **Íalt** | **95** | **93** | **95** | **94** | **98** | **100** | **100** |

*Talva 4.6: Sølan í alkohol litrum, vísutøl 2008-2014*

Talva 4.6 vísur, at vísutalið fyri søluna av alkohol litrum er fallið frá 100 í 2008 til vísutal 95 í 2014. Henda minking er serliga stór í bólkinum spiritus. Alkohol litrarnir í vørubólkinum vín og cider, er einasti bólkur, har alkohol litrarnir eru fleiri, enn teir vóru í 2008.

## 4.4 Fólkatal og gongdin í nýtslu pr. íbúgva

Talva 4.7 niðanfyri vísur í fyrstu linju talið av fólki í Føroyum í aldrinum 15 ár og eldri tann 1. januar árini 2008-2014.

| Fólkatalið | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Miðal 15 ár og eldri** | **38.176** | **37.890** | **37.844** | **37.898** | **37.905** | **37.893** | **37.755** |
| Miðal tils. | 48.442 | 48.121 | 48.133 | 48.326 | 48.471 | 48.554 | 48.462 |
| **Nýtslan, alk.l. pr. íbúgva** | **2014** | **2013** | **2012** | **2011** | **2010** | **2009** | **2008** |
| Alk.l./15 ár + (RSL) | 5,4 | 5,3 | 5,4 | 5,4 | 5,6 | 5,7 | 5,7 |
| **Alk.l./15 ár + (Alt FO)** | **6,3** | **6,3** | **6,6** | **6,4** | **6,7** | **6,9** | **7,0** |
| Tollfrítt (Alt FO) | 1,0 | 0,9 | 0,8 | 0,7 | 0,6 | 0,7 | 0,6 |

*Talva 4.7: Fólkatalið, 15 ár og eldri, tann 1. Januar 2008-2014 og miðal sølan av alkohol litrum*
*Kelda: Hagstovan og egin útrokning*

Um sølan av alkohol litrum gjøgnum RSL (*sí talvu 4.5*), verður sett í mun til talið av íbúgvum, sum eru 15 ár og eldri, sæst at talið av alkohol litrum hevur verið fallandi. Ein lítil hækking sæst tó frá 2011 til 2012, sum aftur í 2013 fall til tað lægsta, síðani RSL varð sett á stovn.

Í 2008 er talið 5,70 alkohol litrar, og síðani er hetta minkað til 5,40 alkohol litrar í 2014, sum ávíst í mittastu linju í talvu 4.7. Hetta eru tó bert tølini fyri søluna av rúsdrekka gjøgnum RSL.

Niðasta linjan vísir tøl, ið umfata søluna gjøgnum Rúsdrekkasølu Landsins og sølu gjøgnum føroysku bryggjaríini. Her sæst, at nýtslan í Føroyum liggur sera stabil í tíðarskeiðnum 2008-2014.

Afturat hesum tølum skal leggjast tað, sum verður selt tollfrítt og innflutt á annan hátt. Tað finnast ikki almenn hagtøl fyri hesa sølu. Tey tøl, ið síggjast niðast í Talvu 4.7 vísa tollfría vøru, seld gjøgnum RSL og føroysku bryggjaríini per. íbúgva 15 ár og eldri. Tað veruliga talið er óivað nakað hægri, tí her vantar tollfrítt innflutt av ferðafólki við skipi og tollfrítt innflutt við ferðafólki, ið hevur keypt rúsdrekka uttanlands.

## 5. Ársroknskapur fyri 2014

Niðanfyri er ársroknskapurin hjá Rúsdrekkasølu Landsins fyri 2014 settur upp í mun til árið 2013. Roknskapurin fevnir um rakstrarroknskap og fíggjarstøðu.

### Rakstrarroknskapur

| | Ár 2014 | Ár 2013 |
|---|---|---|
| Inntøkur: | | |
| Vørusøla | 119.285.669 | 118.800.243 |
| Vørunýtsla | -83.359.042 | -82.410.142 |
| Skiftisavlop | 35.926.627 | 36.390.101 |
| | | |
| Útreiðslur: | | |
| Starvsfólkakostnaður | 12.902.749 | 11.962.624 |
| Avskrivingar | 934.926 | 1.605.924 |
| Annar kostnaður | 6.502.790 | 6.539.240 |
| Útreiðslur íalt | 20.340.464 | 20.107.788 |
| | | |
| Úrslit áðrenn fíggjarpostar | 15.586.163 | 16.282.313 |
| Fíggjarpostar | 23.172 | 2.545 |
| Roknskaparligt avlop | 15.609.334 | 16.284.858 |

| **Avrokning av avlopi, ásett á fíggjarlógini** | | |
|---|---|---|
| Roknskaparligt avlop | 15.609.334 | 15.284.858 |
| Avskrivingar | 934.926 | 1.605.924 |
| Íløgur | 105.634 | -1.034.586 |
| Nettoavlop | 16.649.895 | 16.856.196 |
| Avlop, ásett á fíggjarlógini | 16.848.000 | 16.848.000 |
| Munur | -198.105 | 8.196 |

## Fíggjarstøða

| | 31.12.2014 | 31.12.2013 |
|---|---|---|
| **OGN:** | | |
| Støðisogn | 982.604 | 2.023.164 |
| Vørugoymsla | 11.541.750 | 13.781.217 |
| Vøru- og tænastuáognogn | 674.108 | 390.988 |
| Onnur áogn | - | 3.744 |
| Tíðaravmarkingar | 2.466.401 | 1.077.332 |
| Tøkur peningur | 4.407.093 | 4.226.112 |
| Ogn tilsamans | 20.071.957 | 21.502.558 |
| | | |
| **SKULD:** | | |
| Eginogn | 982.604 | 2.023.164 |
| Vøru- og tænastuskuld | 6.143.249 | 6.631.460 |
| Onnur skuld | - | - |
| Millumrokning við Gjaldstovuna | 10.876.302 | 11.688.225 |
| Tíðaravmarkingar | 548.742 | 322.492 |
| Meirvirðisgjald | 1.521.060 | 833.858 |
| Skuld íalt | 19.089.352 | 19.476.034 |
| Eginogn og skuld tilsamans | 20.071.957 | 21.499.199 |
| | | |
| Leasingskyldur | - | - |
| Leiguskyldur pr. ár pr. 31.12. | 2.219.764 | 2.173.764 |